

## Claus og teir hildu skansan

Leygardagin spældi Blackpool ímóti Yeovil í triðbestu ensku fótbóltsdeildini. Fyrrverandi føroyski landsliðsspælarin Claus Bech Jørgensen var á liðnum hjá Blackpool allar 90 minuttirnar. Blackpool legði seg á odda 1-0 í 57. minutti, og bert tveir minuttir seinni fekk Blackpool ein spælara vístan av vøllinum. Men hóast ein mann í undirtali, helt Blackpool skansan og vann dystin 1-0. Blackpool helt harvið fast um 6. pláss í League One og hevur framvegis møguleikan at spæla um uppflyting.

## Ferguson troyttur av spaniólum

Venjarin hjá Manchester United, Sir Alex Ferguson, er troyttur av áhaldandi søgum um, at Barcelona og Real Madrid skulu keypa Cristiano Ronaldo úr United.

- Barcelona og Real Madrid hava gjørt soleiðis í nógv ár. Hvørja ferð tað er val í felagnum, verða heimsins bestu spælarar drignir upp í valstríðið. Ronaldo er ikki so býttur, at hann ikki veit, hvat tað er, sum gongur fyri seg, sigur Ferusgon við Skysports.

# HB vann brakið

**NSÍ legði seg á odda bara sjey minuttir fyri leiklok, men HB megnaði kortini at vinna seg víðari í kappingini um Løgmanssteypið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Jákup á Borg, sum nú er liðformaður hjá HB, skumpaði avgerandi málið inn, tá HB vann trupla útidystin móti NSÍ*
*Mynd: Álvur*

Talan var um dystin, sum undan leygardegnum varð róptur sum tann mest spennandi, og í so máta livdi hann eisini upp til heitið.

Sum skilst, so var illa spælandi við Løkin men kortini stríddu liðini seg ígjøgnum 120 minuttir.

Málini máttu áskoðararnir tó bíða leingi eftir, tí ikki fyrr enn í 83. minutti kom hol á. Tá megnaði Jónhard Fredriksberg nevnliga at leggja vertirnar á odda, og so ráddi bara um at halda fast.

### Rógvi við í báðum

HB megnaði tó at svara aftur, og báðu ferðirnar átti Rógvi Jacobsen sín leiklut í málinum. Fyrst syrgdi hann fyri longdari leiktíð, tá hann sendi gott langskot í NSÍ-málið.

Og eftir 16 minuttum av umdystinum var Rógvi aftur upp á spæl. Hesa ferð megnaði Jens Martin Knudsen ikki at halda langskotsroynd, og so var Jákup á Borg sum køtturin á returinum.

Og so kundi tað kanska hóskandi verið lagt afturat, at sum skilst, so vóru øll spæliloyvi í lagi, so ivi skuldi ikki verið um, at HB hesa ferð er til reiðar at spæla fjórðingsfinalu til ásettu tíðina.

**NSÍ-HB 1-2 (0-0)**
**1-0:** Jónhard Fredriksberg
**1-1:** Rógvi Jacobsen
**1-2:** Jákup á Borg

# KÍ vann kvinnusteypið

**KÍ vann kappingina um Kvinnusteypið í kvinnufótbólti um vikuskiftið. Í finaluni møttu tær GÍ, og her eydnaðist teimum at vinna 4-2**

FÓTBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Flest øll kenna Klaksvíkskappingina í mansfótbólti. Um vikuskiftið skipaði B36 fyri eini líknandi kapping. Einasti munurin var, at nú vóru tað tey sterkastu kvinnuliðini í landinum, sum vóru umboðaði. Liðini, sum vóru við í kappingini vóru B36, KÍ, GÍ og EB/Streymir, og í hálvfinalunum spældi B36 ímóti KÍ, meðan EB/Streymur og GÍ brustu saman í hinum dystinum.

### KÍ og GÍ í finaluni

Á niðara vølli í Gundadali brustu KÍ og B36 saman í hálvfinaluni, og hesin dysturin bleiv rættiliga spennandi. KÍ fekk tó betru byrjanina uppá dystin, og undan steðginum megnaðu tær eisini at leggja seg á odda 3-0, og her lá eitt rættiligt sorl í luftini.

B36 hevði tó slett ikki spælt so gali, og so við og við raknaði hvítahavnarliðið við. Móti endanum av fyrra hálvleiki megnaðu tær eisini at minka um munin til 1-3, og í seinna hálvleiki minkaðu tær enn meir um munin, tá tær fingu brotsspark. Nú var støðan bráðliga 3-2 til KÍ, og nú var rættiligur spenningur í. Fleiri mál komu tó ikki í dystinum, og so vóru kvinnurnar úr Klaksvík klárar til finaluna.

Á ovara vølli spældu EB/Streymur og GÍ samstundis, og her fekk felagsliðið úr Sundalagnum eina flúgvandi byrjan. EB/Streymur kom nevniliga á odda 2-0 mest sum al fyri eitt, og her sá svart út hjá silvurvinnarunum frá í fjør.

Miðskeiðis í fyrra hálvleiki minkaði GÍ tó um munin til 2-1, sum eisini var hálvleiksstøðan. Í seinna hálvleiki kom EB/Streymir aftur tvey mál fram um, tá Rudy Zachariassen skoraði sítt næsta mál, og henda støðan helt sær líka til eitt korter var eftir av dystinum, men so tók GÍ dik á seg. Síðsta korterið skoraðu tær tríggjar ferðir, og sostatt vóru tær bráðliga á odda 4-3, sum eisini gjørdist endaliga úrslitið. Sostatt skuldu tær møta KÍ í finaluni um Kvinnusteypið.

### KÍ vann finaluna

KÍ vísti enn einaferð í finaluni, at tær eru sterkasta liðið í landinum, tá tað kemur til kvinnufótbólt. Munurin var tó ikki tann heilt stóri í dystinum ímóti GÍ, men KÍ var tó við yvirlutan størsta partin av dystinum.

Í fyrra hálvleiki megnaðu tær at leggja seg á odda, og tá liðini fóru til hálvleiks førdi KÍ 2-1. Í seinna hálvleiki royndi GÍ at koma inn aftur í dystin, men tær gjørdust ov stuttar, og endin av tí heila var, at KÍ vann dystin 4-2. Sostatt hava tær longu vunnið sítt fyrsta steyp í ár.

Í dystinum um triðja plássið vann EB/Streymur heili 6-2 á B36, og tað sermerkta við hesum dystinum var, at Rudy Magnussen skoraði heili fýra av málunum. Sostatt fekk hon seks mál í kappingini, og hon bleiv eisini kosin til besta spælara í allari kappingini.



*KÍ vann sum væntað kvinnukappingina, men bæði B36 og GÍ góvu meistarunum dygga mótstøðu, so spenningurin verður kanski ikki heilt eingin í FM-kappingini*
*Mynd: Álvur*